# Øðrvísi ferðslumynstur

**Ferðslumynstrið til og frá flogvøllinum er broytt, síðan Vágatunnilin vaðr tikin í brúk. Nógv fleiri fólk hava ferðast við egnum bili, og fólk støðast eisini longri á farstøðini á flogvøllinum. Eisini hýruvognar verða nýttir at fara úr Havn á flogvøllin við**

FERÐSLUMYNSTUR
*Edvard Joensen*



*Flogleiðin er komin til Havnar. Bara seks ferðafólk vóru við av flogvøllinum. Sum heild er ferðafólkatalið á flogleiðini hjá Bygdaleiðum minkað við umleið eini helvt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vágar:** Tað eru nógv fleiri fólk í longri tíð á flogvøllinum i samband við komu og fráferð hjá flogførunum, enn tað var, áðrenn Vágatunnilin varð tikin í brúk.

Gongdin higartil hevur verið sum væntað, siga tey av flogvøllinum. Fólk koma fyrr og fara seinni heim aftur í samband við, at flogførini koma og fara.

Fyrr var soleiðis, at øll komu í senn. Bæði tey, sum komu við egnum bili, og so tann stóri bólkurin, sum ferðaðist við flogrutuni hjá Bygdaleiðum.

Nú tunnilin hevur gjørt tað nógv lættari at ferðast, eru nógv fleiri, sum hava valt at koyra við egnum bili. Mangan eru so eisini fleiri við ella eftir teimum, sum fara ella koma við flogfarinum. So talið av fólki, sum kemur á flogvøllin er vaksið munandi hesa tíðina, siga tey av flogvøllinum.

Nú ikki er neyðugt at laga seg eftir ferðaætlanini hjá Ternuni, sæst skilliga, at fólk hava betri tíð. Fleiri verða sitandi, eftir at tey eru komin í land av flogfarinum. Og alt fleiri velja at koma í góðari tíð fyri at sleppa undan at standa í langari bíðirøð til at kekka inn. Tey vilja heldur nýta tíðina yvir einum kaffikoppi inni á farstøðini.

Men tað hevur verið soleiðis nú um høgtíðirnar, at tað er veri enn so altíð, at øll, sum hava verið á flogvøllinum, hava fingið sess við borðini.

Nú hava nógv fólk havt frí og sostatt góða tíð at koma bæði við og eftir ferðafólki. Ofta fleiri í felag eisini. Og tá so eini tvey flogfør í senn hava staðið á vøllinum, hevur verið heilt trongligt, verður sagt av flogvøllinum.

## Eisini hýruvognar

Eitt annað fyrbrigdi, sum í nógv størri mun enn fyrr er komið upp nú, er at fólk fara úr Havn vestur í Vágar við hýruvogni.

Av bilstøðini Auto í Havn verður sagt, at har hava tey merkt týðuligan vøkstur í túrum vestur í Vágar, síðan undirsjóvartunnilin varð tikin í brúk.

Fyrr hendi tað seg bara, at onkur fór líka á flogvøllin við hýruvogni. Men í dag er tað als ikki óvanligt, siga tey. Og heilt bíligt er tað heldur ikki. Túrurin kostar úr Havn 526,- krónur umframt bummgjaldið, so samlaði kostnaðurin fyri at leiga ein hýruvogn úr Havn á flogvøllin verður 714,- kronur.

Men eisini aðrar tíðir, enn tá flogførini koma og fara, leiga fólk hýruvogn vestur í Vágar, siga tey hjá Auto. Tað kemur eisini fyri, at onkur fer vestur eitt vanligt kvøld soleiðis mitt í viku at vitja fólk við hýruvogni, siga tey.

## Færri við bussi

Eisini tey, sum koyra bussarnar á flogleiðini hjá Bygdaleiðum, merkja týðuliga eitt broytt ferðslumynstur.

Ein bussførari, Sosialurin tosaði við á flogvøllinum mikudagin, metti, at ferðafólkatalið við bussinum millum flogvøllin og Havnina, mundi vera farið niður í helvt ella so í mun til tað, sum var áðrenn undirsjóvartunnilin lat upp.

Hendan dagin var bussurin næstan tómur, tá hann fór av flogvøllinum. Seks fólk vóru við frá flogfarinum hjá Maersk Air, sum komið var úr Kastrup. Tó skal sigast, at tað vóru bara 17 ferðafólk við flogfarinum, og ein annar bussur fór eisini av flogfvøllinum til Leirvíkar samstundis, sum Havnarbussurin fór.

Men hendan gongdin hevur veruliga verið, síðan latið varð upp undir Vestmannasundi, segði bussførarin. Hann metti kortini, at tað, at nógv fólk hevur havt frí um jólini og hevur viljað roynt undirsjóvartunnilin, hevur gjørt, at munurin hevur verið so ógvusligur.

Hinvegin hava tað eisini verið dagar nú um høgtíðirnar, at ein bussur ikki hevur klárað at tikið øll ferðafólkini, segði hann.

Sagt verður av avgreiðsluni hjá Flogfelag Føroya á flogvøllinum, at áðrenn tunilin lat upp, mundu fleiri enn 90 prosent av teimum, sum komu við flogfarinum, fara av flogvøllinum við bussi. Men so er ikki í dag.

## Róligari ferðsla

Í bygdunum í Vágum, sum liggja á farleiðini millum meginøkið og flogvøllin, siga fólk, at tey merkja eitt broytt ferðslumynstur, síðan undirsjóvartunnilin lat upp.

Tann til tíðir svakliga koyringin báðar vegir, er hildin uppat, og ferðslan glíður meira róliga gjøgnum bygdirnar.

Fyrr var tað soleiðis, at fólk skundaðu sær av Oyrargjógv á flogvøllin fyri at sleppa at kekka inn sum skjótast. Og ikki minni var ferðin hinvegin aftur fyri at sleppa umborð á Ternuna.

Tað gjørdi av og á, at heldur ivasamar yvirhálingar vórðu gjørdar. Eisini millum hús.

Í dag fara fólk hóvligari avstað, og sonevndu ferðgáarnir, sum settir eru upp, gera eisini sítt til, at munandi økta ferðslan mekist nógv minni enn fyrr.

# Fór út av í hálkuni

**Hált hevur verið um dagarnar, og ymsastaðni eru bilar farnir út av vegnum**

HÁLKA




Tá myndamaðurin hjá Sosialinum týsdagin kom koyrandi norður gjøgnum Hvalvíkina, lá ein lastbilur á liðini oman móti einum neysti við havnarlagið í Hvalvík.

Bilurin var gliðin oman av vegnum, men hevði ikki fingið stórvegis sksaða, skiltist á fólki á staðnum.

Av politistøðini í Havn varð sagt mikudagin, at har høvdu tey onga fráboðan fingið um nakað ferðsluóhapp i Hvalvík týsdagin.

**ej**



# Nógv er broytt, síðan útróðrarmenn lógu og bíðaðu eftir sild inni á Skálafjørðinum

**- Eg minnist, at útróðrarbátar úr Klaksvík lógu og bíðaðu eftir sild inni á Skálafjørðinum undir krígnum. Tá kostaði sildin einar 6-8 ferðir so nógv sum toskurin, sigur áttatiára gamli, Hans Jakku á Gadd á Nesi**

SILD
*Vilmund Jacobsen*

Gamalt er, at mangt umbroytist á mansins ævi. Hetta kann ikki minst sigast um sildina, sum í mong ár er farin fyri spottprís, tí eingin skoytir um hana, hvørki til agns ella matframleiðslu.

Men tað var tann tíð, tá ið sildin var "gylta gullið", sum allir vildu hava hendur á, og tað var eisini tann tíð, tá ið tað loysti seg at seta sildagørn.

Í Sosialinum í gjár høvdu vit samrøðu við Joen-Jacob Johannesen í Søldarfirði, sum hevur roynt eftir sild á Skálafjørðinum í mong ár.

Hann eigur bátin, Katrin, og seinastu vikuna undan jólum, tá ið Havsbrún í Fuglafirði tók ímóti fiski, fingu teir heili 100 tons av sild við nót á Skálafjørðinum.

Aftur hesa vikuna hevur nógv sild verið at fingið, og mánadagin fingu teir tvær ferðir uppí bátin, eini 30 tons tilsamans.

Sildin fer øll til Fuglafjarðar til ídnað, og prísurin er 1 kr. fyri kg.

## Nógv dýrari enn toskurin

Teir gomlu hava ilt við at skilja, at einki verður gjørt við sildina í Føroyum, tí vit keypa jú hópin av sild í gløsum og spannum úr útlandinum - og tá er einki til hindurs fyri at geva nógv fyri hana.

Tað eru tey, sum siga, at føroyska sildin er ikki nóg góð. Er hon ikki ov rak, so er hon ov feit.

Áttatiára gamli, Hans Jakku á Gadd á Nesi, er ein teirra, sum undrast á, hví føroyingar einki gera burtur úr sildini í dag.

- Eg minnist í 1951; tá kostaði toskurin 55 oyru/kg., hýsan 35, longan 17 og brosman 16 oyru/kg., men hetta sama árið fekst tú ikki sild bíligari enn 3 kr. fyri kilo.

Hann minnist eisini, hvussu høgt í metum sildin var undir krígnum.

- Tað var ikki óvanligt, at útróðrarbátar úr Klaksvík lógu her fram við landinum og bíðaðu eftir, at bátarnir høvdu drigið gørnini, so teir kundu fáa agn og sleppa til útróðrar. Eg minnist, at klaksvíksbátarnir kundu lata heilt uppí eina krónu fyri hvørja sildina, teir keyptu, sigur hann.

Hans Jakku vísir á, at tá var sildin avgerandi fyri, um bátarnir kundu sleppa til útróðrar ella ikki, tí at kalla einki annað agn var at fáa.

- Onkur stakk sær nakrar fliður ella fiskaði sær nakrar gággur, men sildin var avgerandi fyri útróðurin, leggur hann aftrat.

## Nógv sildaarbeiði

Hans Jakku minnist sjálvsagt eisini tíðina, tá ið skipini royndu eftir sild norðanfyri og løgdu hana uppá land í Føroyum.

- Ein av teimum stóru keyparunum her um okkara leiðir var D.P. Højgaard. Eg minnist, at teir ein dagin í 1946 ella 1947 keyptu ikki færri enn 300 tunnur av sild frá bátum, sum royndu við gørnum. So, her vóru nógvir bátar, sum fiskaðu sild, og nógv sildaarbeiði var uppi á landi í sildatíðini.

Hans Jakku heldur, at meginparturin av sildini, sum skipini fiskaðu, fór til Danmarkar og til Svøríkis. Tað var ikki fyrr enn seinni, sigur hann, at føroyingar fóru fiska sild við skipum og eisini fóru at selja til Ruslands.

- Hjá okkum gomlu, sum minnast týdningin av sildini og tað arbeiði, hon legði eftir seg, er ilt at skilja, at eingin skal fáa nakað burtur úr sildini í dag, sigur Hans Jakku á Gadd.



*- Hjá okkum gomlu, sum minnast týdningin av sildini og tað arbeiði, hon legði eftir seg, er ilt at skilja, at eingin skal fáa nakað burtur úr sildini í dag, sigur áttatiára gamli, Hans Jakku á Gadd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Skipini farin útaftur

**Við havnaløgini hevur verið trongligt seinastu tíðina, nú skipini hava ligið inni. Tey flestu eru farin útaftur, og landingarmiðstøðir og virkir kunnu aftur brynja seg at taka ímóti fiski**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Veðrið er gott, og væntandi verður fiskiskapurin eisini góður, nú at kalla eingi skip hava verið úti síðan, 18. desember.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Um jóla-og nýggjárshøgtíðina lá at kalla allur okkara fiskifloti við bryggju. Hetta er einki óvanligt hesa tíðina av árinum, men steðgurin var longri enn vanligt. Øll skip, sum komu í havn eftir, 18. desember, tá ið Føroya Skipara-og Navigatørfelag lýsti verkfall, vórðu liggjandi. Men seint leygarkvøldið varð givið leyst aftur, tá ið nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður millum reiðarafelagið og felagið hjá skiparum og navigatørum.

## Viðrar væl

Í tí frálíka veðrinum, sum verið hevur seinastu dagarnar, kann væntast, at skipini, sum nú eru farin út aftur, verða skjót aftur av fyrsta túri. Vanliga er eisini góður fiskiskapur eftir, at flotin hevur ligið - og hesaferð hevur at kalla allur fiskiskipaflotin ligið síðan, 18. desember.

Á Fiskamarknaðinum kunnu tey nú brynja seg til at taka ímóti fyrstu lastunum, og á virkjunum nærkast tíðin, til tey aftur kunnu senda boð eftir arbeiðsfólkunum.

## Rætting

Í týsdagsblaðnum stóð grein um rør í Strandahaga, sum vóru gliðin sundur. Í greinini sigur býarverkfrøðingurin í Klaksvíkar kommunu, at tað var leystliga mett at millum 10 og 15.000 kubikkmetrar av eyri vóru fluttir av øllum vatninum. Hetta talið er tó ikki rætt. Kommunan biður okkum rætta talið til 5.000.